átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Hin fyrsta hvítusunnan

*Ápostlasøgan kap 2, 1-15 (týðing Victor Danielsens)*

1 Táið nú hvítusunnudagur kom, vóru tey øll komin saman á einum staði.
2 Tá kom knappliga ljóð av himli, sum táið óførur stormur brestur á; tað fylti alt húsið, sum tey sótu í.
3 Tungur, eins og av eldi, vístu seg fyri teimum, og tær skiltu seg sundur og settust á hvørt eitt teirra.
4 Og tey vórðu øll fylt av Heilaga Andanum og fóru at tala onnur tungumál, alt eftir sum Andin gav teimum at siga.
5 Nú búðu í Jerúsalem Jødar, menn, sum óttaðust Gud, av øllum fólkasløgum undir himli.
6 Táið hetta ljóð kom, streymaði hópurin saman, og tey vitstu ikki, hvat tey skuldu hugsa; tí tey hoyrdu hvør sítt egna mál talað av teimum.
7 Tey vórðu øll ovfarin og undraðust og søgdu: "Hyggið, eru ikki allir hesir, ið tala, Galilearar?
8 Hvussu ber tað tá til, at vit hoyra teir tala, hvør okkara egna mál, sum vit eru fødd í?
9 Vit, Partar, Medar og Elamitar, vit, sum búgva í Mesopotamia, Judea, Kappadokia, Pontus og Asia,
10 í Frýgia, Pamfýlia, Egyptalandi og landspørtum Libya við Kýrene, og vit úr Róm, sum her búgva,
11 bæði Jødar og trúskiftingar, Kretar og Arabarar - vit hoyra teir tala um stóru verk Guds á tungumálum okkara!"
12 Tey vórðu øll ovfarin og vitstu ikki, hvat tey skuldu hugsa. Og tey søgdu hvørt við annað: "Hvat kann hetta vera?"
13 Onnur søgdu spottandi: "Teir eru fullir av søtum víni!"
14 Tá steig Pætur fram saman við hinum ellivu, tók til orða og talaði til teirra: "Tit jødisku menn og øll tit, sum í Jerúsalem búgva! Hetta veri tykkum kunnigt - lurtið eftir orðum mínum!
15 Hesir eru ikki druknir, sum tit halda - tað er jú triði tímin á deginum

# Byggja út í Malta



*Samkomuhúsið Malta er vorðið ov lítið. Nú er neyðugt við eini munandi útbygging*

**25 ár eftir at arbeiðið í »Malta« byrjaði, er stundin komin at byggja hetta samkomuhúsið út**

**Hirtshals:** Longu í 2003 skiltist, at umstøðurnar at hava møtir og onnur kristilig tiltøk á Malta vóru ov trongar.

Eftir eitt av mongu møtunum greiddi stigtakarin til arbeiðið, Levi Joensen frá, at hetta sunnukvøldið vóru um 100 fólk á møti.

- Tá so nógv fólk eru til staðar, er heldur trongligt í fundarhølinum, segði hann.

Líkt er til, at tey í samkomuni nú ynskja at betra um umstøðurnar. Og í næstum verður farið undir hesa útbyggingina.

Bæði tekningar og byggiloyvi eru fingin til vega.

### Signing

Malta er ein sjálveigandi stovnur, sum fór at virka í 1984. Endamálið er at fremja eitt kristiligt arbeiði millum føroyingar í Hirtshals.

Samkoman er knýtt at Brøðrasamkomunum í Føroyum, og hevur nógv ymiskt virksemi á skránni hvønn mánað.

Tíðin hevur kortini víst seg, at hølini vóru vorðin ov lítil, millum annað var tørvur á einum størri møtisali og hølum til sunnudagsskúlan, ungdómsarbeiðið og frítíðarítrivið.

- Vit mugu bara takka Harranum fyri, at Hann hevur vælsignað hetta verkið so ríkiliga. Mong eru komin til trúgv og vorðin partur av samkomuni øll hesi árini, verður sagt úr Malta.

Júst, hvat henda víðkanin fer at kosta, verður ikki sagt nakað um. Men tey vóna, at mong fara at stuðla hesum arbeiðinum.

# Ov nógv stress í Fólkakirkjuni

**Danmark:** Eitt metstórt tal av prestum eru tey seinastu árini farnir í annað starv, sigur danska Prestafelagið.

- Bara hetta seinasta árið eru 30 starvsfelagar sagt seg úr starvi uttan eftirløn. Hetta er kanska ikki eitt so stórt tal í mun til hinar 2000, men slíkt hava vit aldrin upplivað áður, sigur Sabine Bech-Hansen, forkvinna í Prestafelagnum.

Hon er sera ónøgd við, at einki er gjørt við tilmælini í eini frágreiðing frá 2002 um arbeiðsumhvørvið í Fólkakirkjuni. Í frágreiðingini varð sagt, at fimti hvør prestur hevði stress.

- Fleiri av limunum í felagnum eru illir og ørkymlaðir á ein annan hátt enn áður. Fyri at siga tað bart út: Fólkakirkjan er ikki eitt arbeiðspláss, sum hevur tað gott, sigur hon.

Eftir hennara meting verður tað trupult hjá Fólkakirkjuni at halda fast við prestarnar í framtíðini verður ikki arbeiðsumhvørvið broytt til tað betra.

- Og tað verður tí eisini truplari at fáa ungfólk at lesa til prest, sigur Sabine við Kristeligt Dagblad.

## Hvítusunnuveking kring allan heimin

**Kristindómur:** Í minsta lagi 25 % av heimsins 2 mia kristnu er limir annaðhvørt í eini hvítusunnu- ella karismatiskari samkomu.

Vøksturin í hvítusunnurørsluni í Europa stendur kortini í stað, men í Asia, Afrika og Latín-Amerika veksur hon nógv.

Í fleiri av londunum er henda rørslan tann største, og bara í Guatemala eru 60 % av øllum kristnum karismatikkarar ella hvítusunnulimir.

## - Ein virðiligur samspælari

**Blái Krossur:** Seinnapartin í dag verður móttøka í hølunum hjá Bláa Krossi, nú Hjalmar Hansen tekur við sum aðalskrivari.

Nýggi aðalskrivarin kennir væl til arbeiðið hjá felagsskapinum, og hann hevur gjørt sær sína hugsan um leiklutin hjá Bláa Krossi, og ikki minst um tað at hjálpa teimum, ið hava trupulleikar av rúsdrekka og rúsevnum.

– Tað er sakin, ið má profilerast, ikki bara felagsskapurin. Eg vóni, at vit í Bláa Krossi kunnu vera ein virðiligur samspælari á sosiala økinum.

- Eg vóni eisini, at vit saman við øðrum kunnu hjálpa teimum, sum eru komin í trupulleikar, og forða fyri at onnur koma í trupulleikar, sigur Hjalmar.

## Sáttmáli um urgu til nýggju kirkjuna

**Hoyvík:** Tórshavnar eystara kirkjuráð skrivaði herfyri undir sáttmála við A.E. Lang´s eftf. í Greve í Danmark, um eina umbygda og brúkta urgu til ta nýggju Hoyvíkar kirkju. Eftir ætlan verður kirkjan vígd 4. november í ár.

Ein nýggj stór urga er sera kostnaðarmikil, og kirkjuráðið metti ikki, at ráð vóru til eina nýggja og stóra urgu í fyrstu syftu, og so varð hendan loysnin vald. Tað var Oddvør Johansen, urguleikari í Havnar kirkju, sum kom við uppskotinum frá urgubyggjarunum.

Meginparturin í urguni verður nýtt, meðan pípurnar eru frá øðrum brúktum urgum.

Urgan sum fæst fyri ein sámiligan pening hevur 8 stemmur, og er hon tískil væl brúkilig til vanligar gudstænastur og aðrar kirkjuligar tænastur.

Nevnast kann, at áðurnevnda Oddvør Johansen er sett sum urguleikari við nýggju kirkjuna.

Sosialurin